# *Hey!*

Í 2008/09 fara vit á ymsan hátt at royna
at byggja upp gott samstarv millum heim og skúla,
m.a. við at kunna um ymiskt.

Fyrsta kunningin snýr seg í høvuðsheitum um tilfar á

## www.skulin.fo/NOL

Frameftir verður javnan kunnað á hesi heimasíðu -
bæði fyri at byggja upp gott "skúli/heim" samskifti
og fyri at minka pappírsnýtsluna.

**Visti tú...**
... at børn og vaksin kunnu melda seg til skeið um tey eru lesiveik? Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúli skipar skeið, har arbeiði m.a. fevnir um ein kt-ryggsekk og nógvar aðrar leiðir inn til lesingina. KT sum grundarlag til at hjálpa næmingum at lesa og skriva http://www.kvoldskulin.fo/myfiles/files/kvoldskulafaldarin200809.pdf

**Konsert í Nólsoyar skúla mánadagin 29/9-8**
Vit fáa tónleikarar niðan í skúlan, sum part av tiltakinum "Listaleypurin". Konsertin verður kl. 10 og er tíanverri ikki almenn. Næmingarnir fáa frí kl. 12:15 - men 7. fl. fer sjálvsagt til Havnar kl. 13 fyri at møta í Hoyvikar skúla til alis- og evnafrøði. Frítíðarskúlin hevur fingið boð, at børnini eru fyrr liðug enn vant.

**Nú "húgvu-tíðin" nærkast...**
...verður heitt á foreldur at kemba fyri lús. Onkur lús hevur vitjað skúlabarn og best er at fylgja ráðunum frá Apoteikinum t.d. við at trýsta her Minnist til "...orsakað av vandanum fyri, at lýsnar verða mótstøðuførar fyri lúsaevninum, skulu bert tey, ið hava fingið lýs, viðgerast."

**Vikuseðlarnir**
Vit eru farin at nýta pappírs-vikuseðlarnar aftur, men vónandi finna vit skjótt eina talgilda loysn - serliga við atlitið at ynskiligum nýkeypi og fylgjandi nýtslu :-)

**"2-læraraskipan í yngra bólkinum"**

Í næstum verður lýst eftir lærara fulla tíð afturat okkum í Nólsoyar skúla. Men onnur loysn er funnin hesar báðar vikurnar 22. sept til 5. okt.:

- frá mánamorgni 22. sept. og tvær vikur fram verður Halldis afturat Báru í yngra bólkinum millum kl. 10 og 11:30.
- frá týsmorgni 23. sept. og somuleiðis tvær vikur fram verður Terji afturat Báru í yngra bólkinum millum kl. 8 og 9:30.

**First LEGO League - skúlaárið 08/09**

Eitt lið er meldað til úr Nólsoyar skúla og møguleiki er hjá áhugaðum millum 10 og 16 ár, at taka lut.

Leygardagin 13. september kl. 12:30 verður ársins uppgáva kunngjørd og ymiskt í smb. v/ tiltakið er á: www.hjernekraft.org

Evnið í ár er "Veðurlagsbroytingar", og væntandi vera omanfyri 11.000 lið um allan heim, sum fara at kappast at loysa heimstrupulleikar, gera show, byggja Lego, forrita og hava tað stuttligt!

Tað er smart at fara tíðliga í gongd at fyrireika seg. Tað, sum man kann fyrireika er m.a.:
- finna tilfar um veðurlagsbroytingar
- hugsa um eitt show, búðnar og annað, sum hevur við veðurlagsbroytingar at gera.
- læra seg at byggja og forrita ein robott (Eitt hugskot er, at hyggja á Youtube eftir øðrum robottum!)

8. november verður finalan - aftur í ár í Føroya Tele húsinum uppi í Hoyvík.

# Ferðing

7. flokkur ferðast ókeypis við Rituni
í smb. v/ undirvísingina í alis- og evnafrøði í Hoyvíkar skúla mánadag.
Treytin er, at næmingarnir hava Ritu-kortið við sær!

# Jarðarferð

Tíanverri fingu børnini ikki boð heim, at skúlagongdin
– eins og vanligt – varð merkt av jarðarferðini 25/9-8.
Siðvenja hevur verið, at eingin skúlagongd er, meðan jarðarferð er, í Nólsoy.

Samskifti var við Látrið/frítíðarskúlan,
so vónandi hevur eingin trupulleiki verið av hesum.

Við ynskjum um framhaldandi gott skúlaár
Jákup av Skarði, fyrstilærari

24/09-2008